| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 25. februar 2010 |
| Býráðsfundur nr. | 02/2010 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2010 tann 25. februar kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 18. februar 2010 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Bjørghild Arnholdtsdóttir
Gordon M. Petersen

Dánjal Vang hevur boðað borgarstjóranum frá, at hann vegna forfall ikki kann møta á býráðsfundinum, somuleiðis sum hann heitir á borgarstjóran um at kalla varalimin Gordon M. Petersen inn til býráðsfundin.

Meðan mál nr. 06/2010 varð framlagt og umrøtt luttóku Pætur Joensen, býarverkfrøðingur og Rólant Højsted á fundinum.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 03/2010.**

**Umsókn frá Eyðfríð og Jóhan Hendrik Vík um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211q.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Eyðfríð og Jóhan Hendrik Vík, dagfest 03. februar 2010 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211q á Garåavegi 11 í Fuglafirði sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 16. februar 2010 og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m2.
3. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum.
5. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
6. Kloakkplanur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
7. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.

Byggiloyvi er galdandi í 2 ár frá útskivingardegnum.

Petur Abrahamsen luttók ikki á fundinum, meðan hetta mál varð viðgjørt, vegna ógjegni.

**Avgerð:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (8-0). Meðan málið varð viðgjørt varð Petur Abrahamsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**Mál nr. 04/2010.**

**Umsókn frá Fuglafjarðar sjónleikarafelag um skattafrælsi.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Taks, dagfest 22. januar 2010 í sambandi við ummæli kommununar til umsókn frá Fuglafjarðar sjónleikarafelag um skattafrælsi fyri teirra virksemi.

Toll- og skattstova Føroya hevur heimild sambært skattalógina at játta skattafrælsi til feløg og stovnar vm, um so er, at inntøkan eftir stovnanarskipan, lógum og samtyktum, einans skal verða nýtt til alment góðgerin ella kirkjulig, manngóð, listarlig, vísindalig ella tílík endamál, hetta sambært § 3, stk. 3.

Vísandi til, at Toll- og skattaráðið áðrenn avgerð um skattafrælsi verður tikin í málinum, vil hava álit í hesum føri frá Fuglafjarðar býráði í málinum, so varð málið lagt fyri fíggjarnevndina til ummælis. Hjálagt er avrit av "Lógum fyri Fuglafjarðar sjónleikarafelag".

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 17. februar 2010, og mælir nevndin einmæld býráðnum til at viðmæla yvir fyri Taks, at skattafrælsið verður veitt Fuglafjarðar sjónleikarafelag av virksemi sínum.

**Avgerð:**
Tilmælið frá fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.00.

Jann Toftegaard

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Bjørghild Arnholdtsdóttir

Gordon M. Petersen

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen